UTTAN ÚR HEIMI

# Lótu átta børn sleppa út

**Gíslarænararnir í Moskva lótu nøkur børn sleppa úr leikhúsinum, men øll børnini sleppa ikki út, siga teir.**

GÍSLATØKA Í MOSKVA
*Árni Joensen:*

Teir kekensku gíslarænararnir í Moskva lótu í gjár átta børn sleppa út úr leikhúsinum, har rænararnir hava umleið 700 fólk sitandi gíslar.

Ein jordanskur lækni hjá Reyða Krossi, sum var inni í leikhúsinum, segði, at umleið 30 børn vóru millum gíslarnar. Læknin greiddi eisini frá, at nøkur av børnunum vóru vorðin sjúk, men tað var ikki greitt, um tað vóru hesi børnini, sum gíslarænararnir lótu sleppa út í gjár.

Men samstundis gjørdu rænararnir greitt, at øll børnini sleppa ikki út úr leikhúsinum. Sambært russisku myndugleikunum hevði ein av gíslarænarunum gjørt greitt, at í teirra eygum eru 13 ára gomul børn ikki børn. Gíslarænarin skuldi hava sagt, at í Kekenia fáa børn niður í 10 ára aldur somu viðferð sum vaksin frá teimum russisku hermonnunum har.

Gjáramorgunin ljóðaði, at gíslarænararnir vóru sinnaðir at lata teir umleið 75 útlendingarnar sleppa út úr leikhúsinum. Samstundis vóru nógvir útlendskir sendistovubilar at síggja nærhendis leikhúsinum. Sambært russum eru fólk úr Bretlandi, Niðurlondum, USA, Eysturríki, Týsklandi og Avstralia millum gíslarnar umframt fólk úr fleiri fyrrverandi sovjetlýðveldum.



*Russiska sjónvarpið NTV vístu gjáranáttina myndir av gíslarænarunum og nøkrum av gíslunum. Gíslarænarin høgrumegin við skammbyrsu í hondini er ein kvinna. Myndirnar vístu, at fleiri av gíslarænarunum hava spreingievni bundið at kroppinum júst sum teir palestinsku sjálvmorðsbumbumenninir í Ísrael.*

# Hetta er oddamaðurin

**Tann 26 ára gamli Mosvar Barajev er oddamaður hjá kekensku gíslarænarunum í Moskva.**

GÍSLATØKA Í MOSKVA
*Árni Joensen:*

Russisku myndugleikarnir vita alt um mannin, sum stendur á odda fyri kekensku gíslarænarunum í leikhúsinum í Moskva.

Tann 26 ára gamli Mosvar Barajev tók í fjør við leiðsluni í einum uppreistrarbólki í Kekenia eftir farbróðurin Arib Barajev, sum doyði í skotbardaga við russiskar hermenn.

Bólkur hansara, sum sigur seg vera ein servandan islamskan bólk, er kendu fyri at hava rænt og burturflutt bæði kekenar, russar og útlendingar. Russiska sjónvarpið vísti fyrradagin eina sjónbandaupptøku, sum vísti menn hjá Barajev pína ein fanga.

Tann eldri Barajev bar eisini orð fyri at vera sjáldsama harðrendur. Bretskir myndugleikar siga, at tað var Arib Barajev, sum gav boð um at hálshøggja tríggjar bretskar verkfrøðingar, sum vórðu burturfluttir í Kaukasus fyri nøkrum árum síðani. Samráðingar vóru um at fáa menninar leysar aftur fyri 90 milliónir krónur í loysigjaldi, men sambært bretum trífaldaði yvirgangsleiðarin Osama bin Laden boðið og lat Arib Barajev 270 milliónir krónur fyri at avrætta teir tríggjar bretarnar.

Tey, sum kenna til viðurskiftini í Kekenia, siga, at bólkurin hjá Mosvar Barajev hevur gott samband við teir, sum sótu við valdið í Kekenia frá 1997 til 1999.



*Mosvar Barajev avmyndaður inni í leikhúsinum í Moskva.*
*(Mynd: NTV)*

# Yvirgangsmenn ætla at søkja at ferðafólkatokum

**Amerikansku myndugleikarnir bera ótta fyri fleiri yvirgangsatsóknum frá al-Qaeda. FBI heldur, at yvirgangsmenninir fara at søkja at jarnbreytini næstu ferð.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Upplýsingarnar um komandi atsóknir hava amerikansku myndugleikarnir fingið frá fongslaðum limum í al-Qaeda. Sambært teimum skal ein bólkur hjá felagsskapinum søkja at einum ella fleiri ferðafólkatokum. Aðrar ábendingar siga, at yvirgangsmenninir ætla at spreingja jarnbreytarbrýr í luftina og at søkja at góðtokum, sum flyta vandamikil evni.

Samveldisløgreglan FBI vil eisini vera við, at al-Qaeda fyrireikar atsóknir at oljuútbúnaði ymsastaðni í heiminum. Sagt verður, at FBI hevur loyniligar upplýsingar, sum bera á tað borðið.

Aðrar upplýsingar, sum FBI hevur fingið, benda á, at yvirgangsmenn ætla at søkja at flogførum og skipum, bankum og stjórnarskrivstovum, og at talan serliga er um amerikansk áhugamál, sum tikið verður til.

FBI sigur tó, at í løtuni tykjast yvirgangsmenninir at hava serliga stóran áhuga fyri tokferðsluni í USA. Sagt verður, at løgreglan er komin fram á myndir av amerikanskum tokum og jarnbreytum, sum nakrir av teimum fongslaðu limunum í al-Qaeda høvdu hjá sær.

Tí hevur FBI ávarað løgregluna og jarnbreytarmyndugleikarnar.



# 15 pláss í Vesturstovu fyri 6 milj. krónur

**- Vit hava projekterað at kalla alt sjálvir, sum kommunan hevur sett í verk , eitt nú havnaútbyggingar, tunlar, barnagarð og brandstøð, sigur Leif Petersen, sum saman við Pæturi Joensen starvast á teknisku deild hjá Fuglafjarða kommunu.**

ORÐ OG MYNDIR:
*Vilmund Jacobsen*



*Vesturstova er eitt verk hjá Fuglafjarða kommunu burtur av.*

Hósdagin skipaði Fuglafjarða kommuna fyri móttøku í samband við, at kjallarin í Vesturstovu, sum er eldrasambýlið í bygdini, er liðugur og tikin í nýtslu.

Væl av fólki vitjaði inni á gólvinum hendan dagin og sóu snotuliga verkið, ið kommunan sjálv hevur bygt og goldið úr einum enda í hin.

Í ítrivsrúminum í kjallaranum varð borðreitt við alskyns pinnamati, og har vórðu fleiri røður hildnar. Millum teirra, sum høvdu orðið, var borgarstjórin í Fuglafirði, Sigurd Simonsen, Jóhan Heri Joensen, formaður í mentanarnevndini, Dánjal Vang, formaður í teknisku nevnd, Ása Hanusson, økisleiðari og Páll á Reynatúgvi, landsstýrismaður.

## 6 milj. krónur

Vesturstova, sum annars varð tikin í nýtslu, 29. juni í 1999, stendur í dag í sløkum 6 milj. krónum, og tá eru nakrir snøklar eftir at gera uttan. Allar rokningarnar eru goldnar úr kommunukassanum, og í Fuglafirði vænta tey, at samlaði kostnaðurin av byggingini verður 6 milj. krónur.

Í mun til onnur sambýli og røktarheim kring landið, er íløgan hjá Fuglafjarða kommunu ógvuliga rímilig, tí vanliga verður roknað við, at eitt røktarheimspláss liggur um eina milj. krónur – í summ førum tvær.

Tá ið Røktar-og ellisheimið í Runavík varð bygt á sinni, lá kostnaðurin um 1 milj. krónur fyri hvørt búfólk. Úr Sandoynni hevur ljóðað, at har er kostnaðurin einar 2 milj. fyri hvørt búfólk.

Men hvussu ber tað so til, at fuglfirðingar hava bygt sína snotuligu Vesturstovu fyri minni enn 1/2 milj. fyri hvørt búfólk?

Tað er ein góður spurningur.

Kanska er munurin tann, at Vesturstova er eitt verk, sum kommunan eigur burtur av.

## Leif teknaði

Tekniska deild hjá Fuglafjarða kommunu, sum er mannað við verkfrøðinginum, Pæturi Joensen og byggifrøðinginum, Leif Petersen, hevur projekterað, teknað og havt eftirlitið við allari byggingini.

– Vit hava faktiskt gjørt alt sjálvir her á deildini, sigur Leif Petersen, ið er maðurin, sum hevur teknað Vesturstovu, húsið og innrættingina.

Hann vísir á, at projekteringin byrjaði í 1997, og byggingin byrjaði árið eftir.

- Tað var soleiðis, at tá ið kreppan í handverkaravinnuni tók seg upp, hevði kommunan fleiri handverkarar í arbeiði. Kommunan hevði valið ímillum at lata hesar byggja eldrasambýlið ella at siga menninar úr starvi. Tískil varð sambýlið bygt við fólki hjá kommununi burtur av.

Leif heldur, at hetta var ein góð loysn.

– Einir fýra mans vóru burtur av við í byggingini, og formaður á staðnum var Sveinbjørn á Horni, sum eisini var í starvi hjá kommununi.

Tað vóru Sofus Jacobsen og Jóannes Thomsen, sum stóðu fyri ávikavist vvs og el-innleggingini.

## Kjallarin

Kjallarin í Vesturstovu, sum nú er innrættaður og tikin í nýtslu, er stívliga 300 fermetrar stórur. Har eru trý dupult kømur, ítrivsstova, stova, goymslurúm og tvey baðirúm. Frammanundan var bara fýrrúm í niðaru hæddini.

Alt arbeiði í kjallaranum er gjørt av lokalum handverkarum. Tað er Knút Larsen og seinni, sonurin Jóhan Larsen, sum hevur havt ábyrgdina av timburarbeiðinum.

Hita og sanitet og elarbeiði hava ávikavist Kári Johannesen og aftur Jóannes Thomsen staðið fyri.

Fuglafjarða kommuna hevur sjálv sett hølini í stand, men gólváleggingin er hesaferð komin úr Havnini.

– Gólváleggingin er tað einasta, sum ikki er gjørt av fólki um okkara leiðir, sigur Leif.

Á samkomuni kom fram, at eldri fólk, sum ikki hava so góðar umstøður heima til bað, eru vælkomin í Vesturstovu at fáa sær brúsubað í kjallaranum. Somuleiðis eru tey farin at gera døgurðar, sum heimahjálpir kunnu heinta og lata teimum, tey vitja.

Lyft er sett upp millum ovaru og niðaru hæddirnar, og ventilatiónsskipan er sett upp um alt húsið.

Eitt av búfólkunum í Vesturstovu, er Jákup Oluf Jacobsen, sum er gamal byggimeistari. Hann býr á sambýlinum saman við konu síni.

Hóast hann er føddur í 1917, hevur hann verið so óførur at plantað í lítla havan, sum er omanfyri húsið. Hetta er sera vakurt, og Jákup Oluf syrgir sjálvur fyri, at havin er snøggur og verður hildin viðlíka.

## Fór - og kom

Leif Petersen, sum er teknarin aftanfyri Vesturstovu, varð sagdur úr starvi hjá Fuglafjarða kommunu í kreppuárunum. Í fýra ár arbeiddi hann fyri seg sjálvan – við hamara, sum hann sjálvur tekur til. Leif byrjaði annars at arbeiða hjá kommununi longu í 1984.

– Kreppuárini vóru ein torfør tíð hjá okkum handverkarum, men eg megnaði at hóra undan her heima, sigur hann.

Eftir at hava verið í sjálvstøðugari vinnu í fýra ár, sendi kommunan aftur boð eftir honum, og síðan hevur hann arbeitt á teknisku deild.

Tað áhugaverda er, at tekniska deild hjá Fuglafjarða kommunu, har Pætur Joensen er leiðari, sjálv hevur staðið fyri at kalla øllum tí, sum gjørt er í kommununi í fleiri ár.

- Vit hava projekterað at kalla alt sjálvir, sum kommunan hevur sett í verk, eitt nú havnaútbyggingar, tunlar, barnagarð og brandstøð, sigur Leif Petersen.

Venda vit at enda aftur til Vesturstovu, hava búfólkini har rættiliga gott útsýni úr vindeygunum omaneftir. Tey síggja útyvir vánna og beint niður yvir barnagarðin og fótbóltsvøllin.

Fuglafjarða kommuna hevur valt ikki at krógva tey gomlu, sum hava slitist fyri seg, burtur úr nærumhvørvinum.



*Ása Hanusson, økisleiðari, segði eisini nøkur orð á samkomuni.*



*Sigurd Simonsen er bygdaráðsformaður í Fuglafirði.*



*Alskyns pinnamatur til tey mongu, sum stukku inn á gólvið.*